# Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 02.09 | KÍ-VB/Sumba | Ransin N. Djurhuus |
| 02.09 | NSÍ-B36 | Eiler Rasmussen |
| 02.09 | HB-B71 | Petur Reinert |
| 02.09 | EB/S-Skála | Jens Petur Brattalíð |
| 02.09 | AB-GÍ | Rúni Gaardbo |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 01.09 | B68-TB | Jón Kári í Brekkunum |
| 01.09 | ÍF-LÍF | Høgni Hansen |
| 01.09 | KÍ-FSV04 | Eugen Voda |
| 01.09 | NSÍ-HB | Bárður Mortansson |
| 01.09 | SÍ-B36 | Rói Jacobsen |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 02.09 | GÍ-MB | Bjarki Danielsen |
| 02.09 | Skála-EB/S | Berint Andreasen |
| 02.09 | ÍF-FSV04 | Andrias Josephsen |
| 02.09 | B68-KÍ | Kristian S. Petersen |
| 02.09 | Fram-B36 | Thorvald Petersen |

# Eingi gummibein í toppinum

**Hóast B36 fer til Runavíkar uttan tríggjar lyklaspælarar, so vilja hvørki teir í árstalsfelagnum ella í NSÍ góðtaka, at hetta fer at hava stóra ávirkan á gongdina**

**NSÍ-B36**
*Jóannes Hansen*

Endaspurturin nærkast, og harvið verður tættari millum lyklauppgerðirnar, sum fara at avgera, hvar FM heitið í 2007 skal enda.

NSÍ hevur ongantíð vunnið FM, men nú eru teir væl fyri. B36 var meistari í 2005, og B36 hevur verið sannførandi nógvu tær seinastu ferðirnar. Undan toppuppgerðini við Løkin er tað sjálvandi bági hjá árstalsfelagnum, at tríggir lyklaspælarar sita uttanfyri við leikbanni. Men Kurt Mørkøre, B36 venjarin, gremur seg ikki um, at Jákup Mikkelsen, Santos og Mikkjal Thomassen ikki veru tøkir.

- Soleiðis eru treytirnar. Um tú skalt vera í toppinum, so skalt tú hava góðar menn at seta inn, og tað haldi eg, at vit hava. Nú fáa Ingi Højsted, Heini í Skorini, Oddmar Færø, Klæmint Matras, Jóhan V. Gunnarsson, Kenneth Jacobsen og allir hinir møguleika at vísa, at teir eru førir fyri at loysa hesa uppgávuna, og eg havi í vikuni sagt við teir, at eg avgjørt rokni við, at teir gera tað, sigur B36 venjarin.

Størsta broytingin hjá B36 er tað, at Jákup Mikkelsen ikki verður í málinum. Á 18 ára føðingardegi sínum síðsta sunnudag, varð Jóan Pauli Jakobsen settur millum B36 stólparnar, og har verður hann eisini sunnudagin:

- Longu undan kappingarbyrjan segði eg við 17 ára gamla unglingan, at eg roknaði við honum, og at tað var eingin ivi um, at ábyrgdin fyri at verja málið fór at verða løgd á hann, um Jákupi skuldi borist frá. Hesum hevur Jóan Pauli livað við og arbeitt fram ímóti, og eg havi treytaleyst álit á honum sunnudagin, sigur Kurt Mørkøre.

Tit taptu 3-0 í Runavík fyrr í ár?

- Tað hava vit ikki gloymt, og vit minnast sjálvandi, at Andersson, sum nú er millum okkara spælarar, skoraði øll málini. Eg haldi ikki, at tann dysturin kann brúkast sum grundarlag undir metingini av tí, sum nú stendur fyri. Vit spældu 4-4-2 tá, og tað riggaði illa. Síðani hava vit funnið okkara spælskipan, og úrslitini vísa, at liðið hevur funnið stevið, og vit trívast væl. Allir eru fokuseraðir, og eingin tosar um FM, men bara um hesa eina uppgávuna.

Kurt Mørkøre sigur, at teir fara til Runavíkar fyri at vinna, men tað kennist sum um, at teir í B36 høvdu verið fegnir, um teir í hvussu so er høvdu eitt stig í viðføringum suður aftur.

Í NSÍ leguni er spenningurin ógvuliga stórur. Felagið liggur hálva øld eftir stovnanina væl fyri at vinna sítt fyrsta FM. Tá ið royndirnar ikki eru so stórar, so plaga gummibeinini at spøkja. Tað hava tey ikki gjørt higartil í Runavík, og sambært liðformanninum, Óla Hansen, so er eingin orsøk at rokna við tí møguleikanum:

- Áskoðararnir eru spentir, men vit fáa góðan frið. Spælararnir tosa ikki um FM. Sunnudagin er stór avbjóðing á skránni, men vit síggja hana sum eina av sjey, sum eru eftir, áðrenn kappingin verður liðug. Eftir 27 umfør verður gjørt upp, og so fáa vit at síggja, hvørja plasering vit hava spælt okkum til.

Hvussu verður sunnudagin?

- Talan verður fyri okkum um strevna og tætta avbjóðing. B36 hevur síðstu nógvu vikurnar staðið seg væl, og vit rokna ikki við, at tað fer at hava serligt árin á teirra avrik, at tríggir lyklaspælarar eru uttanfyri. Teir hava nógv fólk, og nýggju menninir kenna hetta sum teirra møguleika.

Tit vunnu stórt ímóti B36 á heimavølli fyrr í summar?

# Við – ikki við

**Skaddur: Morten Overgaard (menisk)**
**Ivasamur: Fróði Clementsen: (knæ), Jónas Tór Næs (vøddaskaði)**
**Við aftur: Evrard Ble (leikbann), Rógvi Poulsen (skaða)**
**Ikki við: Ragnar Poulsen (fluttur av landinum)**

**Leikbannaðir: Alex José dos Santos, Mikkjal Thomassen, Jákup Mikkelsen**
**Skaddur: eingin**
**Við aftur:**

**Leikbann: Flavio Lucio Silva de Santana**
**Við aftur: Símin Hansen (Leikbann), Jóhannes Jensen (leikbann), Jónsvein Thomsen (skaða)**

**Skaddur: Zsolt Zekeres (menisk), Jákup Martin Joensen (rygg)**
**Ivasamur: Sorin Anghel (fótlið)**

**Leikbann Atli Gregersen**
**Skaddur: Sámal Joensen (knæskaði)**
**Ivasamur: Hans Pauli Petersen, Hans Jørgen Djurhuus**

# Ógvusligur munur í úrtøkuni

Mitt í summar var KÍ tað liðið, sum tey bæði undir niðurflytingarstrikuni vónaðu at fáa fatur í. Soleiðis er tað ikki longur. Sunnudagin fer VB/Sumba at vitja í Klaksvík, og nú sigur stigatalvan, at Suðuroyarliðið hevur ellivu stig, meðan KÍ hevur 25 stig.

Serliga tær seinastu ferðirnar hevur munurin verið ógvuliga stórur í úrtøku. KÍ hevur fingið trettan stig burtur úr seks teimum seinastu ferðunum, meðan úrtøkan hjá VB/Sumba hevur verið trý stig burturúr seks teimum seinastu umførunum.

Stóri stigamunurin aftur til tey aftastu ber við sær, at KÍ so at siga er leyst av hóttanini um niðurflyting, meðan teir í VB/Sumba eftir tapið á heimavølli ímóti AB ivaleyst mugu finna seg í leygardagsfótbólti næsta ár.

Hvussu tað fer at ávirka avrikið hjá VB/Sumba, at liðið mest sum er flutt niður, fæst fyrsta ábendingin um í Klaksvík, har suðuroyingarnir í 2. umfari løgdu rygg til 5-0 tap.

-mørk

# Nú skal HB siga takk fyri seinast

Tað eru ikki meistararnir í HB, sum hava hagtølini á sínari síðu, tá ið sandoyingar seint seinnapartin sunnudagin fara at vitja í Gundadali. B71 og HB hava dystast tvær ferðir fyrr í summar, og sandoyingar hava báðu ferðirnar fingið fult. Í 2. umfari eyðmýktu uppflytararnir meistararnar fullkomuliga. B71 vann 3-0 í Gundadali, og tá ið HB í 12. umfari vitjaði á Sandi, var B71 aftur omaná. Sandoyingar vunnu ta ferðina 2-1.

Síðani eru tingini vend á høvdið. Nú HB fær vitjan av B71, eru havnarmenninir rættiliga væl fyri, meðan úrtøkan hjá B71 nógvu tær seinastu ferðirnar hevur verið lítil. FM vinnararnir eru á bronsuplássinum, og tvær tær seinastu ferðirnar hava teir lyft seg nærri oddaliðunum.

B71 hevur bara fingið eitt stig tilsaman fýra tær seinastu ferðirnar. Sandoyingar hava spælt seg til møguleikar, men teir hava ikki verið stinnir framman fyri mótstøðumálunum.

-mørk

# Soleiðis he

**Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava dystast í tilsvarandi dystunum í bestu fótbóltsdeildini seinastu 10 árini.**